## Rangers á odda

Rangers liggur nú til at vinna skotska meistaraheitið í fótbólti. Um vikuskiftið spældu Rangers og Celtic týðandi toppdyst, og Rangers vann dystin 1-0. Dysturin var intensur við nógvum nærdystum og seks gulum kortum, men tað kom bert eitt mál í dystinum. Tað skoraði Rangers í fyrra hálvleiki. Málskjútti var Steven Davis. Rangers liggur nú 1 stig frammanfyri Celtic, men tríggir dystir eru eftir at spæla·



## Ballack heldur fram

Enska blaðið The Times skrivar um vikuskiftið, at týski landsliðsspælarin Michael Ballack heldur fram í Chelsea. Sáttmálin millum Chelsea og Ballack gongur út í summar, men sambært Times hava partarnir longt samstarvið við einum ári. Ballack, sum er 32 ára gamal, vinnur umleið eina millión krónur um vikuna í Chelsea.

B68-KÍ 2-0 (1-0):

# Tað var einki at rafla um

*B68*

*KI*

**Heimaliðið hevði bæði størri breidd og tyngd, tá ið KÍ varð sent av Svangaskarði við trivaligum 2-0 tapi**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyri toftamenn er skráin ikki serliga vinalig. Nú seks umfør eru farin, hevur B68 bara spælt tvær ferðir á heimavølli, og næstu ferð skulu teir aftur spæla á útivølli.

Undanfarnu árini hevur tað serliga verið á útivølli, at B68 hevur roynst væl, meðan úrtøkan burturúr heimadystunum hevur verið lakari. Soleiðis hevur ikki verið higartil í ár. Men eftir trý útitap eydnaðist tað fyri viku síðani at fara úr Runavík við 2-2. Á heimavølli hevur úrtøkan verið so góð, sum tað ber til: Trý stig ímóti AB og hesa ferð trý stig ímóti KÍ.

Í fleiri av undanfarnu umførunum hevur óroynda liðið úr Klaksvík kent seg ikki at hava marginalirnar við sær. Tá ið trúføstu áskoðararnir – teir eru framvegis lutfalsliga nógvir – seint seinnapartin í gjár fóru av Svangaskarði, var tað ikki við fatanini av, at marginalirnir høvdu verið í parti við mótstøðuliðnum.

Serliga í 1. hálvleiki var munurin heilt stórur. Tað stemmaði illa hjá teimum bláu og hvítu. Tað er ikki undur í, at tapini bera við sær, at sjálvsálitið minkar. Og tað ber aftur við sær, at eftiransingarnar ikki eru so avgjørdar, at færri bjóða seg til, og at bólthaldarin harvið oftari verður kroystur at taka løttu loysnina, sum er at sparka í staðin fyri at spæla, og so er tað so skjótt, at mótstøðuliðið aftur er omaná.

KÍ venjararnir hava valt at givið nógvum blaðungum og óroyndum monnum møguleikan. Onkrir av teimum eldru fáa ikki spælt, tí teir eru skaddir, men millum teirra, sum alla tíðina hitaðu beinkin í góðveðrinum á Svangaskarði, vóru spælarar við royndum, og sum heilt víst kundu lyft hugburðin. Eitt nú Oddmar á Lakjuni.

### Høvdu fleiri møguleikar

Onkra ferðina tók Vlada Filipovic bóltin, men KÍ hevði ongan orduligan málmøguleika.

Felagi hansara í KÍ málinum hevði meiri at gera. Fleiri ferðir vísti Jákup Mikkelsen, at hann framvegis er ein finur aftasti skansi, og fyri gestirnar var tað væl sloppið, at heimaliðið bara var frammanfyri við einum máli, tá ið teir fóru at hvíla seg.

Leiðslumálið skoraði Keita fimm minuttir fyri hálvleik. Hann tveitti seg fram og stýrdi við høvdinum bóltin í málið, eftir at unglingaspælarin Jóan Símun Edmundsson hevði sneitt framvið fleiri mótstøðumonnum, áðrenn hann legði innfyri.

Í 2. hálvleiki royndi KÍ at leggja meiri fyri í álopspartinum. Men tyngdin og broddurin vóru lítil, og í hinum endanum vóru fleiri vandastøður í góðum mótálopum. Tá ið ein tími var farin, skoraði B68 til 2-0, og so var spenningurin burtur. Ein av nýggju monnunum, Niklas Joensen, sum var vongverji í høgru, stýrdi við høvdinum bóltin í málið, eftir at hin vongverjin, liðformaðurin Øssur Hansen, hegnisliga hevði lagt frísspark innfyri úr høgru.

Løtu seinni varð málskjúttin vístur av vølli, tí dómarin metti, at hann hevði taklað ov harðliga. Harvið vóru klaksvíkingar fyri aðru ferð í eina viku síðstu minuttirnar yvirmannaðir á útivølli, men heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað teimum at spæla seg til møguleikar og at skjóta mál!



*Klaksvíkingar fóru enn einaferð vónbrotnir av vøllinum. Tapið á Svangaskarði ber við sær, at KÍ nú er mest sum púrasta avbyrgt í botninum á stigatalvuni*
*savnsmynd*

## Bill sær ljóst upp á tað

Hann er uppvaksin í KÍ, men tá ið hann er á lønarlistanum hjá B68, so sigur tað seg sjálvt, at B68 venjarin, Bill Jacobsen, var væl nøgdur, nú hansara fyri aðru ferð í ár fóru av heimavøllinum við fullari úrtøku:

- Hesa ferð vóru vit greitt omaná. Míni hagtøl siga, at vit høvdu ellivu skot á málið hjá Jákupi, sum stóð stinnur, og teir høvdu tvey skot á okkara mál. At vit skoraðu so stutt undan steðginum bar við sær, at teir í 2. hálvleiki vóru noyddir at flyta seg longri fram, og tað passaði okkara heilt væl. Eftir at vit høvdu økt um leiðsluna, var spurningurin bara, hvussu stórur sigurin fór at verða.

Og nú skulu tit spæla í Gøtu?

- Tað verður heilt onnur uppgerð. Víkingur er trý stig frammanfyri okkum, so tað fer at hava nógv at siga fyri okkum at vinna. Okkum dámar væl at spæla í Sarpigerði, og vit hava sjálvsálit, nú vit fyrireika okkum til ta uppgávuna, sigur væl nøgdi Bill Jacobsen.

**-jh**

## Nú ræður um at skora fyrst

Tað er einki at siga til, at klaksvíkingarnir vóru eitt sindur fáligir, tá ið teir fyri fjórðu ferð á rað fóru av vøllinum við ongum.

Men formaðurin, Tummas Lervig, vildi ikki bara síggja svart upp á tingini:

- Hesa ferð kiksaði tað orduliga. Undanfarnu ferðirnar hava vit kent tað soleiðis, at marginalirnir hava verið ímóti. Á Svangaskarði var B68 væl betri.

Nú verður talan um botnuppgerð, tá ið 07 Vestur fer at vitja í Klaksvík?

- Tað fara venjararnir, sum vit hava álit á, saman við spælarunum at fyrireika seg til. Um tað eydnast okkum at skjóta fyrsta málið, so rokni eg við, at tað fer at ganga. Og um tað eydnast at vinna eina ferð, so vænta vit, at tað fer at gleppa. Spælararnir eru ungir, og tað hevði komið væl við, um marginalirnir høvdu verið við.

Umhugsa tit at styrkja um liðið?

- Vit hava valt henda leistin, og vit hava ikki aðrar ætlanir. Onkrir spælarar hava verið skaddir, sum vit vóna skjótt verða førir fyri at spæla aftur. Vit hava framvegis álit á, at tað ber til at venda gongdini, sum sjálvsagt ikki hevur verið góð, staðfestir KÍ formaðurin, Tummas Lervig.

**-jh**